

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 08 - 2013

# Tyrluvanlukka við Hetland- Fýra deyð

Trý lík eru funnin í sjónum, har ein tyrla við oljuarbeiðarum ávegis til flogvøllin í Sumburgh í Hetlandi, mátti neyðlenda í gjárkvøldið. Leitað verður enn eftir einum persóni. Polittið sigur tó í morgun, at fýra persónar hava latið lívi vanlukkuni, ein kvinna og tríggir menn í aldurinum 45 til 59 ár. Tilsamans 14 av teimum 18 fólkunum umborð vórðu í gjárkvøldið bjargað og flutt við bjargingartyrlu til Lerwick, har tey fingu viðgerð fyri ymsar smærri snuddir. Tyrlan, sum var av slagnum Super Puma koma frá boripallinum Borgny Dolfin, sum arbeiðir fyri Total miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Umborð vórðu 16 oljuarbeiðarar og tveir pilotar hjá felagnum CHC, sum stendur fyri flúgvingini. Tað var mjørki og nakað av vindi, tá óhappið hendi. Tyrlan misti bráddliga motormegi og datt í havið tveir fjórðingar vestan fyri Sumburgh. Ein av teimum bjargaðu sigur, at tað gingu bara fá sekund frá tí, at tyrlan rakti sjógvin, til hon koppaði. Har var lítil og eingin tíð at koma sær úr tyrluni, og tey, sum komu úr henni, vóru fólk, sum sótu við hurðarnar. Òhappið verður tikið í størsta álvara í Skotlandi, tí hetta er triðju ferð eftir fáum árum, at tyrlur hjá felagnum CHC eru neyðlendar, og hinar ferðirnar hevur orsøkin verið brek í gearkassanum. Tær ferðirnar vórðu øll tó bjargað. Nøvnini á teimum deyðu eru: Duncan Munro, 46, úr Bishop Auckland Sarah Darnley, 45, úr Elgin Gary McCrossan, 59, úr Inverness George Allison, 57, úr Winchester. Keldur: BBC News, Guardian, ITV News, Shetland Times